# Eftir bókini

*Oddaliðið í landskappingini hjá monnum, var sunnudagin og vitjaði botnliðið úr Runavík, og úrslitið gjørdist, sum fólk flest høvdu væntað*

JÁKUP MØRK

Tjaldur-VÍF 24-33 (11-16)

Tað gjørdist eingin endurtøka av »næstan sensatiónini«, tá VÍF vitjaði inni í Runavíkini. Úrslitið gjørdist ein greiður sigur til vestmenningar, og var hetta nokk heldur ikki meira enn væntað.

Onkuntíð hava oddaliðini kanska havt dekan ov góðan hug at sovna, tá dysir hava verið móti botnliðunum, men hesu ferð datt VÍF ongantíð í tað grøvina.

**Rógvi við aftur**

Teir settu seg nevnliga beinan vegin á dystin sunnudagin, og tá tíggju minuttir vóru leiktir, var munurin longu seks mál.

Eftir hetta tóku teir sær meira av løttum, men spennandi gjørdist dysturin ongantíð, til tess var munurin millum liðini alt ov stórur.

Mest merkisverda hendingin í dystinum var, at Rógvi Nielsen nú er aftur á vøllinum, eftir at hann hevur verið skaddur alt kappingarárið.

Ivaleyst ein hugalig staðfesting hjá vestmenningum, sum hava havt sítt at dragast við, hvat skaðum viðvíkur.

**Aftur leysir í toppinum**

Við sigrinum løgdu vestmenningar seg aftur tvey stig fram um Neistan og StÍF, men vestmenningar hava tó leikt fleiri dystir enn hesi bæði liðini.

Betur man tó vera at hava fingið stigini í posan, og megnar Kyndil at leggja fót fyri Neistanum týsdagin, munnu gullvónirnar hjá vestmenningum kanska gerast nakað bjartari.

Enn er tó einki avgjørt í so máta, men í øllum førum er líkt til, at vinnarin av landskappingini í ár, helst skal vinna sær væl meira enn tey 25 stigini, sum StÍF hevði seinasta ár.

Líkt er í øllum førum til, at tey fýra ovastu liðini øll fara at fáa 18 stig burtur úr dystunum móti niðaru liðunum, og so er spurningurin, hvussu gongst í innanhýsis dystunum millum toppliðini.

Her hava Vestmenningar longu tapt tvær ferðir í endaspælinum, og eftir øllum at døma, skulu teir ikki missa serliga nógv afturat, um teir ætla sær enda ovastir.

Vanliga verður tikið til, at tað er kalt uppi á toppinum, men hetta orðafelli kann í øllum førum ikki nýtast um kappingina hjá monnum hetta kappingarárið, tí líkt er til, at tað verður alt annað kalt á toppinum, tá avgerandi dystirnir skulu avgreiðast komandi góða mánaðin.

**Dysturin í tølum**

**Málskjúttar:**
Tjaldur: Sverri Justinussen 9 (3), Ragnar Olsen 4, Elias Hansen 4, Arnfinn Langgaard 2, Jón S. Gleðisheygg 2, Súni Fr. Johannesen 2, Áki Hansen 1
VÍF: Sámal Joensen 7, Martin Hummeland 7, Ingi Olsen 6 (1), Agnar Joensen 5 (1), Harald Bjørgvin 3, Johnny Joensen 3, Rógvi Nielsen 1, Petur Fr. Joensen 1
**Brotskøst:**
Tjaldur 3, VÍF 3
**Útvísingar:**
Tjaldur 2, VÍF 1
**Dómarar úr Neistanum:**
Hjalmar Petersen og Kristian Johansen



*Tað eydnaðist Agnari Joensen at skjóta fimm mál í dystinum sunnudagin*

***Savnsmynd***



*Hans Áki leikti, sum vanligt, ein sera góðan dyst í verjupartinum, men harumframt eydnaðist honum eisini at skjóta ikki færri enn átta mál sunnudagin, tá Kyndil og H71 dystaðust uppi á Hálsi*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

# Linligt á Hálsi

*Aðru ferð innan fimm dagar vóru hoyvíkingar vertir fyri einum liði, sum lá ovarlagari á stigatalvuni, og aðru ferð máttu teir leggja rygg til stórtap*

JÁKUP MØRK

H71-Kyndil 19-31 (7-17)

Hetta kappingarárið hevur ikki staðið nakað serliga væl til í hondbóltshøpi hjá hoyvíkingum, og eftir at hava sæð teir báðar seinastu dystirnar hjá liðnum, munnu flestu áskoðararnir vera sannførdir um, at við verandi gongd fer at enda heilt galið.

Góðu dagarnir tey bæði undanfarnu kappingarárini munnu helst ikki vera gloymdir enn, men í øllum førum skal nógv broytast, um hoyvíkingar skulu gera sær vónir um luttøku í oddastríðnum og steypafinalum.

Sunnudagin var tað Kyndil, sum stóð hinumegin miðlinjuna, og hóast Kyndil fyri fyrstu ferð í ár var Wardumleyst, so gjørdist rættuliga skjótt greitt, at heldur ikki hesu ferð skuldu hoyvíkingarnir hava nakað serliga at siga.

**Kyndil átti alt**

Eftir at hoyvíkingar tíðliga í dystinum høvdu eina eitt máls leiðslu, stóð tað nevnliga Kyndil á restini.

Grønu havnarmenninir tóktust vera væl fyrio, og uttan stórvegis hóvasták, spældu hoyvíksverjuna tunna ferð eftir ferð, ella vórðu álopini endað við skotroyndum útifrá, har serliga Petur var ein stór hóttan.

Tað sigur eisini eitt sindur um støðuna hjá hoyvíkingum, at tá fyrri hálvleikur var liðugt spældur, høvdu teir einans fingið tíggju mál seinastu 60 dystarminuttirnar, og við slíkari málskjóting er ikki serliga lætt at fáa fatur á nøkrum stigum.

Einasti hoyvíkingurin, sum skaraði fram úr hesu ferð, var Olaf Vestergaard, men tíanverri var tað ikki fyri nakað vakurt hondbóltsavrik. Heldur var tí hann í seinna hálvleiki fekk triðju útvísingina og harvið reytt kort, eftir at hann so at siga allan dystin hevði roynt at fingið sinnið hjá Hans Áka í kók.

Hetta eydnaðist tó ikki, og eigur Hans Áki rós uppiborið fyri tað. Gaman í fekk hann tvær útvísingar, men hetta er meira ein avleiðing av hansara spælistílið, har hann ongantíð sparir seg í nærdystum.

**Mugu styrkjast**

Kyndil helt við sigrinum framhaldandi fast í møguleikanum fyri heiðursmerkjum. Ikki tí, hesin dysturin var ikki tann týdningarmesti á árinum, men hinvegin telja øll stigini eins nógv.

Mikudagin stendur tó ein nakað torførari uppgáva fyri framman, tá Kyndil skal royna seg móti Neistanum. Einki er at ivast í, at kyndilsleiakararnir eru grammir eftir stigunum í hesum dysti, og harafturat hava teir helst einki ímóti at leggja fót fyri grannunum í gullstríðnum.

Higartil hevur Neistin tó vunnið allar innanhýsis uppgerðirnar í landskappingini, men hinvegin eydnaðist tað Kyndli at vinna steypafinaluna, so líkindini fyri einum spennandi dysti skuldu verið góð.

Hoyvíkingar hava nú frí í hálva aðru viku, áðrenn teir enn einaferð skulu royna seg móti einum toppliði. Tá verða tað strandingar, sum koma á vitjan, og mett eftir avrikunum í farnu viku, er lítið at ivast í, at hoyvíkingar heldur einki fáa burtur úr hesum dystinum.

Yvirhøvur skal rættuliga nógv broytast, um hoyvíkingar skulu fáa nakað sum helst stig afturat hetta kappingarárið, og skulu teir gera sær nakrar vónir um at luttaka í nøkrum oddadysti komandi árini, skal mangt og hvat henda.

Leiðsla felagsins hevur tó áður verið sera virkisfús, og hvør veit, um hovíkingar ikki fáa onkran styrk til komandi kappingarár. Í øllum førum er eingin ivi um, at teir hava tørv á allari hugsandi styrk.

**Dysturin í tølum**

**Málskjúttar:**
H71: Halgir Dahl Olesen 5, Eyðun H. Højgaard 5, Tróndur Vatnhamar 3, Einar Brimnes 3, Bárður Brimvík 2, Rene Dahl Olesen 1 (1)
Kyndil: Regin Petersen 8, Hans Áki Dahl Christiansen 8, Jacob Jónsson 6 (2), Rúni Poulsen 5, Janus Einar Sørensen 3, Niels Viggo Niclasen 1
**Brotskøst:**
H71 2, Kyndil 2
**Útvísingar:**
H71 5, Kyndil 2
**Diskvalifikatión:**
H71 1 (3x2 minuttir)
**Dómarar úr Stjørnuni:**
Geir Wardum og Carsten Andersen



# StÍF heldur fast um vónirnar

*Í einum dysti, sum fyrra hálva tíman var meira spennandi enn strandingar ætlaðu, fingu føroyameistararnir enn tvey stig í posan*

JÁKUP MØRK

KÍF-StÍF 21-27 (10-12)

Tað vóru toppur og botnur, sum hittust, tá StÍF sunnudagin legði leiðina til Vestmanna, har Kollfirðingar tóku ímóti.

Alt árið hava liðini stríðst í hvør sínum enda, og tískil var eisini væntandi, at strandingarnir skuldu fara av vøllinum sum sigursharrar. Tó so, tá liðini hittust í grundspælinum, var heilt nær við, at KÍF koppaði føroyameistarunum, so viðhaldsfólkini hjá heimaliðnum mundu helst vóna, at okkurt fór at spyrjast burtur úr dystinum sunnudagin.

**Spældu fyri møguleikanum**

Skjótt var eisini greitt, at leikararnir hjá KÍF eisini høvdu vónir um eitt gott úrslit, tí eftir at StÍF hevði fingið ta betru byrjanina, fóru teir á heimaliðnum brádliga at gera um seg.

Gestirnir royndu eisini sítt, men vanliga kvika og vakra álopsspælið riggaði so als ikki, og KÍF megnaði at vinna sær eina trý mála leiðslu.

Eftir eitt time-out, fingu strandingar tó meira skil á spæl sítt, og seinastu 10 minuttirnar av hálvleikinum fingu teir vent gongdini, soleiðis at tað vóru teir, sum vóru frammanfyri, tá farið varð til hálvleiks.

Seinna umfarið royndu kollfirðingar framhaldandi at stríðast fyri møguleikanum, og hóast føroyameistararnir rættuliga tíðliga megnaðu at økja enn meira um leiðsluna, so royndi heimaliðið alla tíðina at skapa eitt sindur av spenningi í dystinum.

Sum ikki einaferð, so var tað Óla Kristian, sum gjørdi mest um seg, tá hann fleiri ferðir bjargaði skotroyndum frá gestunum. Áskoðararnir fingu tó annað at tosa um, tá Eddie Joensen brádliga varð sendir á vøllin.

Eddie hevur nevnliga slettis ikki spælt hetta kappingarárið, og einki er at ivast í, at kollfirðingar hava verið sera harmir um hetta. Størsti veikleikin á liðnum hevur alt árið verið, at teir hava alt ov fáar skjúttar, men nú Eddie er komin aftur í aftur, røkist kanska fyri, at henda støða gerst nakað øðrvísi.

Hjá Strandingum er nakað øðrvísi statt, tá tosað verður um skjúttar. Vanliga eru tað John og Artur, sum gera mest um seg í málskjótingini, men sunnudagin vórðu teir báðir so væl og virðiliga yvirhálaðir av leikandi venjaranum, Jónleif Sólsker. Ikki færri enn tíggju mál fekk hann hesu ferð, og sjálvur helt hann, at tað mundi vera eini trý ella fýra ár síðani, at tað hevði skorist so væl hjá sær.

**Aðalmálið er rokkið**

Komandi mikudag, skulu bæði liðini aftur royna seg móti liðum, sum eru í mótsatta enda av stigatalvuni.

Kollfirðingar skulu tá royna seg móti VÍF, og útlitini fyri stigum í hesum dysti munnu ikki vera av teimum bestu.

Tað er tó ikki nøkur katastrofa, um kollfirðingar eisini skuldu tapt hendan dystin. Teir hava so at siga tryggjað sær, at teir í øllum førum ikki enda niðastir, tá kappingarárið er lokið, so aðalmálið fyri árinum er longu rokkið,

Strandingar leggja leiðina til Runavíkar, har botnliðið Tjaldur tekur ímóti. Enn hevur Tjaldur einki stig fingið síðani endaspælið byrjaði, og einki er at ivast í, at StÍF eru stórfavorittar at vinna dystin mikudagin.

Hetta er helst eisini neyðugt, um føroyameistararnir framhaldandi vilja vera partur í gullstríðnum, har VÍF og Neistin eru hinir luttakararnir.

**Dysturin í tølum**

**Málskjúttar:**
KÍF: Petur Martin Poulsen 7 (1), Petur Martin Johansen 4 (1), Vagnur Johansen 4, Eddie Joensen 2, Óli Kristian Djurhuus 1, Jákup Dam 1, Emil Petersen 1, Jónálvur Johannesen 1
StÍF: Jónleif Sólsker 10 (4), John Petersen 5, Marius Joensen 5, Artur Johansen 3, Bent Durhuus 2, Sveinbjørn Poulsen 1, Kartin Danielsen 1
**Brotskøst:**
KÍF: 5, StÍF 5
**Útvísingar:**
KÍF 3, StÍF 2
**Dómarar úr Tjaldur:**
Kári Hansen og Dánjal Hansen



*Strandingar hava framvegis góðan møguleika at verja FM heitið*

***Savnsmynd***

# Ayr komið í fjórðingsfinaluna

*Annað umfarið á rað eydnaðist tað føroyska felagnum í Skotlandi at vinna móti liði, sum dagliga spælir í Premier League*

JÁKUP MØRK

Leygardagin skuldi Ayr United aftur royna seg í skotsku steypakappingini, og aftur hesu ferð var tað eitt lið úr bestu skotsku deildini, sum var á hini vallarhálvuni.

**Vunnu**

Endin av dystinum var, at føroyska liðið vann dystin 4-3, eftir at teir tvær reisur høvdu verið aftan fyri.

Sum tað skilst á skotsku fjølmiðlunum, so var talan um ein óvanliga ljótt spældan dyst, og sum skilst, so gjørdi dómarin als einki fyri at forða hesum.

Fimm gul og eitt reytt kort vórðu givin í teir níti minuttirnar, sum dysturin vardi, men blaðmenninir eru á einum máli um, at hetta talið kundi væl verið hægri.

**Ikki við**

Hvørgin av føroysku leikarunum vóru við í dystinum leygardagin.

Jens Kristian Hansen er enn ikki komin ræua fyri seg aftur, og Jens Martin Knudsen hevur lítið og einki spælt, meðan hann hevur verið í skotska felagnum.

Í næstum fer málverjin aftur til Íslands, har teir nú eru farnir undir fyrireikingarnar til komandi kappingarár.

Hvussu verður hjá Jens Kristiani í framtíðini tykist enn nakað óvist, men leiguavtalan við B36 rennur út um ein mánað.




